# Tann tigandi kollveltingin


Noreena Hertz er búskaparfrøðingur, journalistur og høvundur

**Ein ensk kvinna hevur skrivað eina bók, sum á enskum kallast "The Silent Takeover".**

**Kvinnan eitur Noreena Hertz og er búskaparfrøðingur, journalistur og høvundur. Hon hevur doktaraheiti í búskapi frá Cambridge. Tá hon var 23 ára gomul fyrst í nítiárunum sendi Heimsbankin hana til Russlands at leggja russarum lag á, hvussu teir skiftu tann kommunistiska búskapin út við fríhandil, og hon skipaði fyri, at ein keypsskáli – børsur – varð stovnaður í Santa Pætursborg. Men mitt í tí heila leyp hon frá. Í staðin fór hon upp í ein felagsskap, sum er ímóti kapitalistisku altjóðagerðini (globaliseringini).**

**Bókin, sum hevur undirheitið "Altjóða kapitalisma og deyði fólkaræðisins", er umsett til 11 mál og seld í fleiri 100.000 eintøkum. Høvuðsboðskapurin er, at politiska skipanin er í ferð við at missa tamarhaldið á maktini í verðini. Maktin fer í staðin til tær heimsumfevnandi fyritøkurnar, til fjølmiðlarnar og áhugabólkar.**

**Noreena Hertz sigur, at hon er fyri kapitalismu, men ikki fyri altjóðagerð. Bókin kom út fyrstu ferð í 2001. Hon kom út dagførd í 2003, og tað er tann útgávan, sum er brúkt her.**

**Finnbogi Ísakson hevur lisið ta norsku útgávuna, sum kallast "Den tause revolusjonen" og hevur burtur úr henni gjørt hesi úrdrøg.**

## 1. partur

VINNUBÓKMENTIR
*Finnbogi Ísakson*



Internetið hevur skapt heilt nýggjar møguleikar at fáa orðið á fólk. Noreena Hertz byrjar sína bók við, at tað var ígjøgnum Internetið, hon frætti um mótmælisgongurnar í Genova 20. juli í 2001, tá tey stóru ídnaðarlondini, G-8, høvdu ársfund har. Áheitanin á netinum ljóðaði: *"Ver til staðar, um tú heldur, at altjóðagerðin, globaliseringin, er farin av leið. Ver til staðar, vilt tú mótmæla alheims kapitalismuni. Um tú heldur, at fleirtjóða fyritøkurnar eru ov sterkar. Um tú heldur, at tey fólkavaldu lurta ikki longur. Ver til staðar, vilt tú verða hoyrd ella hoyrdur."*

Tey, sum mótmæltu í Genova, vóru "veteranarnir" úr Seattle, Melbourne, Washington, Prag, Nice, Quebec og Gøteborg. Tað var ein skurvut blanding, sum mótmælti í Genova, og tey vóru, eins og Noreena Hertz, fyrireikað til, at politiið fór at leggja uppí, men høvdu ikki væntað, at italska politiið fór at vera so harðrent. Tað, sum undraði hana mest, var kortini tann stóra felagskenslan millum tey ymisku áhugamálini, sum mangan bóru upp ímóti hvørjum øðrum, kenslan av vinalagi og eind kring eina felags mótstøðu ímóti status quo. Hon hevði heldur ikki væntað slíkan ágang, sum tá anarkistar teirra millum sorlaðu rútar og brutu verjugarðarnar niður, sum italska politiið hevði sett upp at halda heimsins leiðarum innan fyri og mótmælisfólkum uttanfyri.

Allarminst hevði hon hugsað, at tey fólkini, hon tosaði við, vóru so fullkomiliga vónbrotin av politikki og politikarum, stórfyritøkum og handilsmonnum.

14 ár eftir, at stríðsvognar seinast koyrdu inn á Reyða Torgið, og 14 ár eftir, at Berlinmúrurin fall, eftir tað longsta búskaparliga vakstrartíðarskeiðið í nýggjari tíð, økjast mótmælini óvanliga skjótt. Tað eru fólk úr øllum samfelagsløgum, sum mótmæla – vanlig fólk sum liva eitt vanligt lív, húsmøður, lærarar, forstaðarfólk og fólk av tí betra slagnum. Millum mong onnur finnast í antialtjóðagerðar felagsskapinum ríkmaðurin George Soros og Joseph Stiglitz, Nobellønarvinnari og fyrrverandi sjeføkonomur í Heimsbankanum. Aftrat hesum koma fakfeløg, pensjonistar, fyrrverandi starvsfólk í fyritøkum, sum eru farnar á húsagang, og partabrævaeigarar.

Um allan heim seta fólk spurnartekin við trúskapin hjá myndugleikunum og ætlanirnar hjá fyritøkunum. Tey stúra fyri, at kapitalisman hevur fingið ov víðar ræsur, og at ov nógvir taparar eru. Tey halda, at fólk kunna ikki líta á, at staturin røkir teirra áhugamál, og at vit gjalda ov høgan prís fyri búskaparvøksturin. Tey kvíða fyri, at dundrið frá vinnulívinum køvir fólksins rødd, skrivar Noreena Hertz. Hon heldur fram:

*"Tann ævintýrligi endin á søguni, sum byrjaði í Westminster 3. mai 1979, tá Margaret Thatcher fekk maktina, og sum síðani er endurskapt í USA, Latínamerika, Eysturasia, India, um meginpartin av Afrika og Evropa – søgan um gøtur, steinsettar við gulli, og íverkseting av amerikanska dreyminum – kann ikki haldast at vera sjálvsagdur longur…. Tað dryppar ikki altíð á deknin, tá tað regnar á prestin. Mark er fyri vøkstri. Staturin vil ikki verja okkum. Eitt samfelag, sum bara og blakta lýður marknaðarins ósjónligu hond, er ikki einans ófullfíggjað, tað er órættvíst."*

### Arvurin eftir Thatcher og Reagan

Í heiminum eftir kalda kríggið yvirtaka tær stóru fyritøkurnar uppgávurnar hjá statinum. Handils-maðurin gerst máttmiklari enn politikarin, og handilsslig áhugamál koma fram um alt annað.

Heimurin við teirri tigandi kollveltingini byrjaði við harradøminum hjá Margaret Thatcher. Saman við Ronald Reagan gav hon stórfyritøkunum ómetaligt vald. Tær vunnu marknaðarpartar, sum demokratiið mátti svíða fyri. Eftir tey liggur tað, sum í dag er hugsjónin um meginpartin av heiminum.

Dagsins politikkur kann avmyndast sum italska mótahúsið Benetton. Tey seinastu 19 árini hevur fyritøkan reklamerað sum ongin onnur við myndum av svøltandi børnum, deyðkomnum AIDS-sjúklingum og deyðadømdum amerikanskum fangum, sum bíða eftir deyðans sproytu. Alt fyri at gera vart við seg og selja – ikki fyri at gera nakað sum helst við hesi mál.

Tað sama gera politikarar í valstríðnum, eitt nú í USA. Mótstøðumaðurin verður dálkaður persónliga, og fólk verða ávarað ímóti hansara mistøkum. Flokkarnir tosa um at broyta lívið

*Framhald á næstu síðu*